Bárður á Steig Nielsen
Helgi Abrahamsen
Magnus Rasmussen
Erhard Joensen
Eyðdis Hartmann Niclasen
Kaj Leo Holm Johannesen
vegna Sambandsflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.
(Broyting í mótrokning av pensjón)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við § 5 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 19 verður sum nýtt stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Stk. 1 og 2 eru ikki galdandi fyri persónar, ið ikki hava aðra pensjónsuppsparing enn pensjón sambært hesi lóg."
Stk. 3-9 verða eftir hetta stk. 4-10.

2. Í § 20, stk. 1 verða áðrenn nr. 1 sum nýggj nr. sett:
"1) arbeiðsinntøka,
2) endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sbrt. § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur,
3) dagpeningur vegna sjúku sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku,"
Nr. 1-2 verða eftir hetta nr. 4-5.

3. Í § 20 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Stk. 1, nr. 1-3 eru ikki galdandi, tá inntøkugrundarlag verður roknað sambært løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar."
Stk. 2-8 verða eftir hetta stk. 3-9.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Føroyska samfelagið er í løtuni í tí støðu og hevur verið tað seinastu árini, at arbeiðsmarknaðinum tørvar arbeiðsmegi innan fleiri ymisk arbeiðsøkir. Serliga innan vælferðarøkið, t.e. heilsu-, eldra- og heimarøkt, er stórur tørvur á fleiri hondum, og eisini bæði innan tænastu- og framleiðsluvinnuna, t.d. matstovur, hotell, fiska- og alivirkir og byggarí.

Upplýsast kann, at arbeiðsloysið síðan korona hevur ligið niðanfyri 1,0 prosent, svarandi til færri 200 fulltíðararbeiðsleys - í september 2023 var arbeiðsloysið 0,6 prosent.

Fleiri av okkara eldru borgarum hava bæði heilsu, hug, orku og møguleikar at halda fram við at arbeiða aftaná náddan pensjónsaldur, men okkara skipan við mótrokningni av arbeiðsinntøku omanfyri 45.000 kr. árliga ger hetta lítið áhugavert og stimbrandi. Tí vil Sambandsflokkurin við hesum lógaruppskotinum avtaka mótrókningina fyri arbeiðsinntøku hjá pensjónistum og gera tað meira áhugavert fyri teir pensjónistar, sum hava heilsu, hug, orku og møguleikar til at arbeiða og taka eitt eyka tak - og verða longur á arbeiðsmarknaðinum.

Eitt økt og stabilt útboð av arbeiðsmegi er eisini við til at varðveita og menna okkara vælferðarsamfelag.

Allar pensjónsinntøkur skulu framvegis verða mótroknaðar, og vil hetta yvir tíð verða ein stórur partur av samlaðu inntøkuni hjá pensjónistum. Síðan tað bleiv tvungið at spara upp til egna pensjón í 2014, er samlaða pensjónsuppsparingin økt munandi og hetta verður enn størri frameftir.

Samstundis sum størri partur skal gjaldast inn í pensjón, hava fleiri og fleiri spart upp í longri áramál, hetta vil síggjast aftur sum ein munandi uppsparing komandi árini. Hetta er við til at tryggja langtíðarhaldføri av framtíðar pensjónsútgjøldum, tá tey ið hava verið á arbeiðsmarknaðinum við fullari uppsparing verða fult mótroknaði.

1.2. Galdandi lóggáva

Tað eru framdar ymiskar broytingar í verandi lóggávu, sum eru við til at eggja pensjónistum at átaka sær eitt lønandi arbeiði, men tað eru enn nakrar óhepnar forðingar, sum halda pensjónistum frá hesum, tí arbeiðsinntøkan verður mótroknað í pensjónini.

Stutt um lógina

Tá fólkapensjónistar hava inntøkur aftrat pensjónini – t.d. arbeiðsinntøkur ella privatar pensjónir, lækkar fólkapensjónin eftir einum ávísum hátti. Hetta kallast mótrokning. Í almannapensjónslógini § 19, stk. 1 er tað soleiðis orðað "Viðbótin til fólkapensjón verður lækkað við 20% av inntøkugrundarlagnum". Tað merkir, at um fólkapensjónistur hevur inntøku á 100 kr., lækkar viðbótin við 20 kr.

Mótrokning virkar sum ein øktur marginalskattur. Hevur ein fólkapensjónistur inntøku, rindar hann marginalskatt av inntøkuni, men harumframt missir hann ein part av pensjónini. Marginalskattur og tað, sum hann missir av pensjónini, verður tilsamans í viðmerkingunum til hetta lógaruppskotið kallað fyri effektivur marginalskattur.

Fólkapensjónistar kunnu býtast í 5 ymiskar bólkar:

1. Verandi pensjónistur - ógiftur
2. Verandi pensjónistur - giftur. Pensjónsupphæddin treytað av egnari inntøku
3. Verandi pensjónistur - giftur. Pensjónsupphæddin treytað av inntøkum hjá hjúnunum tilsamans
4. Komandi pensjónistur - ógiftur
5. Komandi pensjónistur - giftur

Í mun til nr. 2 og 3 omanfyri er tað soleiðis, at pensjónistar kunnu velja, um pensjónin skal vera treytað av inntøku hjá hjúnunum tilsamans, ella um tað einans er egin inntøka, sum er avgerandi.

Eitt hugtak, sum hevur týdning víðari í lýsingini av hesum lógaruppskoti, er inntøkugrundarlag. Persónar, sum hava inntøku av ávísari upphædd aftrat pensjónini, fáa lægri pensjón. Tað er inntøkugrundarlagið, sum avger pensjónsupphæddina. Inntøkugrundarlag kann vera arbeiðsinntøka, egin uppspard pensjón (tó ikki kapitalpensjón), rentuinntøka og aðrar inntøkur, sum verða skattaðar eftir kapitalvinningsskattalógini. Fólkapensjón, viðbót til ávísar pensjónistar og útgjald frá AMEG eru ikki partur av inntøkugrundarlagnum. Inntøkugrundarlag verður altíð uppgjørt sum ársinntøka.

Pensjónistar í arbeiði
Í einari viðmerking, sum ískoyti til ein § 52a fyrispurningi í 2022 frá Erhard Joensen, løgtingsmanni, sigur Almannamálaráðið fylgjandi um, hvussu nógvir pensjónistar hava aðra arbeiðsinntøku enn pensjónina (tey, sum eru 67 ár við ársbyrjan 2022):

"Í tølunum, sum Almannaverkið hevur útvegað, vóru 627 fólkapensjonistar av misgáum ikki tiknir við. Talan er um ein bólk av fólkapensjonistum, sum Almannaverkið ikki hevur inntøkuupplýsingar hjá. Men vit vita tó somikið, at hesir 627 fólkapensjonistarnir sannlíkt hava høgar inntøkur og tí sannlíkt eru í arbeiði. Talan er um fólkapensjonistar, sum bara søkja um grundupphædd. Og grundupphæddin verður útgoldin uttan mun til aðra inntøku, og tí er onnur inntøka ikki viðkomandi fyri Almannaverkið.

Almannaverkið hevur upplýsingar um kyn, aldur og bústað hjá teimum 627 pensjonistunum, sum manglaðu í upprunaliga svarinum, og tí eru teir við í talvu 1 og 2 niðanfyri. Tað ber ikki til hjá Almannaverkinum at siga, hvaðani inntøkan hjá hesum 627 pensjonistunum stavar, og harvið um hesir 627 pensjonistarnir arbeiða í almenna- ella privata geiranum.

Gev gætur, at tað eru 212 persónar í aldrinum 67 og 68 ár, sum hava útsetta pensjón. Hesir eru á arbeiðsmarknaðinum og eru tí tiknir við í talvu 1 og 2.

Talva 1. Fólkapensjonistar við arbeiðsinntøku - skift á kyn og aldur

Kyn	67-68 ár	69-72 ár	73-75 ár	76 ár og eldri	Íalt
Konufólk	289	449	159	190	**1.087**
Mannfólk	435	629	270	401	**1.735**
Íalt	**724**	**1.078**	**429**	**591**	**2.822**

Kelda: Almannamálaráðið

Talva 2. Fólkapensjonistar við arbeiðsinntøku - skift á aldur og øki

Øki	67-68 ár	69-72 ár	73-75 ár	76 ár og eldri	Íalt	69+ ár við arb.innt.
Suðurstreymoy	278	451	188	318	**1.235**	39%
Eysturoy	158	239	95	111	**603**	33%
Norðoyar	98	130	52	58	**338**	33%
Norðurstreymoy	48	74	30	45	**197**	29%
Suðuroy	63	95	29	20	**207**	21%
Vágar	52	56	22	23	**153**	27%
Sandoy	25	26	10	10	**71**	24%
Uttanfyri Føroyar	2	7	3	6	**18**	
Íalt	**724**	**1.078**	**429**	**591**	**2.822**	

Kelda: Almannamálaráðið

Fyrivarni ísv. talvu 1 og 2: Tølini fyri pensjónistar 69 ella eldri kunnu vera onkustaðni millum 0 og 100 persónar ov høgt sett. Orsøkin er, at Almannaverkið ikki kennir inntøkuupplýsingar hjá 627 pensjonistum. Í gomlu pensjónsskipanini var inntøkan hjá hjúnum altíð løgd saman, og tað merkti, at um annar hjúnafelagin hevði høga inntøku, so fekk hin hjúnafelagin onga viðbót. Hjúnini hava síðani 1. jan. 2021 havt møguleika at broyta hetta soleiðis, at pensjónin verður ásett eftir egnari inntøku. Men hetta verður broytt eftir umsókn, og tað kunnu vera nøkur hjún, sum ikki hava søkt um broyting. Og tí kunnu tað enn verða nakrir giftir pensjonistar (í gomlu pensjónsskipanini), sum einans fáa grundupphædd, tí at hjúnafelagin arbeiðir.

Tað ber ikki til at geva eitt fullfíggjað svar uppá spurningin um, hvussu nógvir pensjonistar hava arbeiðsinntøku frá ávikavist almenna- og privata geiranum, tí tað eru umleið 840 pensjonistar, har Almannaverkið ikki veit, hvaðani arbeiðsinntøkan stavar. Talan er sum nevnt um:

- Tað eru 627 fólkapensjonistar, sum eftir gomlu pensjónsskipanini bara søkja um grundupphædd. Almannaverkið hevur ikki inntøkuupplýsingar um hesi og kann tí ikki siga, hvaðani inntøkan stavar.
- Tað eru 212 persónar í aldrinum 67 og 68 ár (pensjónsnýskipan), sum hava útsetta pensjón. Almannaverkið hevur ikki upplýsingar um, hvar hesi arbeiða.

Tað eru tó 1.983 fólkapensjonistar, har Almannaverkið kann siga, hvaðani inntøkan stavar, og sum sæst í talvuni niðanfyri.

Talva 3. Fólkapensjonistar við arbeiðsinntøku - skift á ávikavist almenna- ella privata løn

Alment/privat	67-68 ár	69-72 ár	73-75 ár	76 ár og eldri	Íalt	í pct
Alment	295	419	145	110	**969**	49%
Privat	217	378	171	248	**1.014**	51%
Íalt	**512**	**797**	**316**	**358**	**1.983**	

Kelda: Almannamálaráðið”

Talvurnar vísa m.a., at tað serliga eru fólk í aldursbólkinum 67-68 ár og 69-72 ár, sum hava arbeiðsinntøku, og eisini eru tað flest menn, sum hava arbeiðsinntøku. Flestu pensjónistar, sum hava arbeiðsinntøku, koma úr Suðurstreymoy og Eysturoy.

Spurningurin er so, hvat potentialið er fyri, at verandi pensjónistar fara at arbeiða enn meira og um teir, sum ikki hava arbeiðsinntøku í løtuni, fara at átaka sær eitt arbeiði. Potentialið skal eisini síggjast í mun til samlaða talið av eldri í einum arbeiðsbólki og heilsustøðuna hjá teimum. Talan er ikki um ein homogenan bólk av eldri, men um eldri sum heilsuliga eru ymiskt fyri, og eldri ein verður, jú meira avgerð heilsan, hvørt ein er førur fyri at átaka sær eitt lønandi arbeiði.

Samanumtikið um galdandi lóggávu - verandi og komandi pensjónistar
Føroyska pensjónsskipanin er – í mun til pensjónsskipanir í flestu øðrum londum – serlig á tann hátt, at pensjónistar, sum arbeiða fulla tíð, fáa eina lutfalsliga høga pensjónsupphædd frá tí almenna útgoldna aftrat lønarinntøkuni. Meginreglan í øðrum londum er, at tey, ið hava vanligar arbeiðsinntøkur, ikki fáa stórvegis pensjón frá tí almenna. Undantakið er tó danska pensjónsskipanin, sum í ein ávísan mun líkist tí føroysku.

Harumframt sleppa allir fólkapensjónistar undan at gjalda arbeiðsmarknaðargjøld, sum er ALS, barsilsskipan og AMEG.

Ein høg mótrokning er ein vansi hjá teimum, sum hava ávísar inntøkur. Tey, sum fáa pensjón eftir verandi skipan, verða serliga hart rakt, tá inntøkan fer uppum eitt ávíst mark.

Vansin við at hava ta høgu mótrokningina, sum er í verandi skipan, er, at tey, sum verða mótroknað, verða ógvuliga hart rakt. Við øðrum orðum loysir tað seg ikki fíggjarliga at arbeiða. Hinvegin er tað ein fyrimunur, at intervallið, har mótroknað verður, er so stutt. Tá mótrokningarprosentið lækkar, verður tað altíð ein avleiðing, at mótrokningin strekkir seg til hægri inntøkur, og tað verða fleiri, sum verða rakt av mótrokningini og uppliva ein hægri effektivan marginalskatt.

Við broytingunum, sum komu í gildi 1. januar 2020, varð mótrokningin lækkað, men kortini er samlaði effektivi marginalskatturin rættiliga høgur. Tá mótrokningarprosentið lækkar, strekkir mótrokningin seg longri upp eftir á inntøkustiganum, og tað merkir, at inntøkur heilt upp ímóti 400.000 kr. verða raktar av mótrokning. Hetta er somuleiðis inntøkur, sum hava hægri prosentsats í landsskattatalvuni.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Lógaruppskotið skal vera við til at tryggja eitt enn hægri útboð av arbeiðsmegi, og at hetta kann fást lutfalsliga skjótt og lætt at virka.

Tað hevur týdning, at ein slík skipan, sum lagt verður upp til her, byggir á, at tað altíð verður eitt frítt val hjá tí einstaka pensjónistinum - treytað av áhuga, heilsu, orku o.a.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Lógaruppskotið hevur við sær, at arbeiðsinntøka ikki longur skal mótroknast í pensjónini, t.e. mótroknast í grundarupphæddini og viðbótini.

Við hesari broytingini verða verandi pensjónistar vónandi eggjaðir at arbeiða meira, enn teir gera í dag. Eisini er at vóna, at pensjónistar, sum í dag ikki hava eitt lønandi arbeiði, verða eggjaðir at átaka sær eitt arbeiði.

Talvan niðanfyri vísir munin á verandi skipan við mótrokning og nýggju skipanini, har arbeiðsinntøka ikki verður mótroknað. Um pensjónisturin hevur eina árliga arbeiðsinntøku á kr. 250.000 fær hann eftir nýggju skipanini útgoldið kr. 3.416 meir um mánaðin, kr. 26.903 í mun til kr. 23.487.

Talva 4. Pensjónistur sum arbeiðir, stakur

Pensjónistur sum arbeiðir, stakur		
	Verandi	**Nýggj skipan**
Arbeiðsinntøka	250.000	250.000
AMEG	72.840	72.840
Viðbót	59.256	59.256
Grundupphædd	51.684	51.684
Frádrátt fyri arbeiðsinntøku	-41.000	
Skattskyldug inntøka	346.096	346.096
Landsskattur	47.719	47.719
Kommunuskattur	63.219	63.219
Skattur íalt	110.938	110.938
Ársinntøka	**281.842**	**322.842**
Útgoldið pr. mðn.	**23.487**	**26.903**

Sí annars talvurnar í Fylgiskjali 1: Útrokningar av skatti o.a., sum m.a. vísir marginalskattin hjá pensjónistum (ógift og gift), tvs. støðan áðrenn og eftir hesa lógarbroytingina við avtøku av mótrokning. Talvurnar vísa eisini, at munurin á inntøkuni eftir skatt gerst enn meira týðuligur, jú hægri inntøkan er, hetta í báðum førum sum gift og ógift.

Inntøkugrundarlagið fyri útrokning av viðbót til ávísar pensjónistar verður ikki broytt.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum, ið skulu gerast í hesari og aðrari lóggávu sum fylgja av broytingunum í hesum lógaruppskoti.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Vísandi til omanfyristandandi talvur kann roknast við, at umleið 2.800 pensjónistar hava aðra arbeiðsinntøku enn fólkapensjónina - sí talvu 1, 2, og 3 omanfyri.

Fíggjarligu avleiðingar, sum standast av at avtaka mótrokningina eru av Almannaverkinum mettar at verða umleið 55 mió. kr. +25 mió. kr. = 80 mió. kr. tilsamans brutto, árliga. Talan er um hægri útreiðslur fyri landskassan til pensjónir - upphæddir, sum áður vórðu reguleraðar niðureftir vegna arbeiðsinntøku.

Hinvegin kann væntast, at um arbeiðsinntøkan hjá t.d. 750 fólkum hækkar frá kr. 45.000 upp til kr. 200.000, so verður skattainntøkan umleið 40 mió. kr. hægri árliga. Herumframt kann roknast við, at hægri inntøkuupphæddin hjá pensjónistum fer í umferð og gevur fleiri nýtsluinntøkur. Um pensjónistarnir fáa eina hægri inntøku á 116 mió. kr. og hægri pensjónir á 55 mió. kr. verða útgoldnar, tá mótrokningin verður avtikin og vit siga at 30% kemur inn í mvg og ørðum umsetningsavgjøldum gevur tað aðrar 40 mió. kr. meir í almennu kassarnar. Samanlagt gevur hetta kr. 80 mió. meir í almennu kassarnar, 40 mió. kr. meir í skatti og 40 mió. kr, meir í nýtsluinntøkum.

Talva 5. Skatta- og avgjaldsinntøkur av arbeiðsinntøku hjá pensjónistum

Tús. kr.	**Arbeiðsinntøka**			**Skatta- og avgjaldsinntøkur**		
Pensjónistar - 9.000	**Verandi skipan**	**Nýggj skipan**	**Meir-inntøka**	**Skattur (land/kom.)**	**Nýtslu-inntøkur**	**Meir skatta- og avgjaldsinnt.**
Broyttar fortreytir						
Hækkað arbeiðsinntøka hjá 750	45	200		35%	30%	
Hækkað skattskyldug inntøka	33.750	150.000	116.250	40.688	22.669	63.357
Hækkað pensjónsútgjøld		55.000	55.000		16.500	16.500
					Íalt	**79.857**

Metingar og útrokningar um fíggjarligar avleiðingar, byggja m.a. á upplýsingar frá Almannaverkinum og egnar metingar. Tað avgerandi fyri úrslitið av fyriliggjandi útrokningum og hvussu realistiskar hesar eru, eru serliga tær fortreytir, sum liggja til grund, og hesar fortreytir ber til at broyta ella hava ymiskar meiningar um.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið við tað, at Almannaverkið skal tillaga sínar skipanir í mun til nýggja inntøkugrundarlagið.

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur positivar avleiðingar fyri vinnuna og tað almenna í strembanini eftir at útvega meira arbeiðsmegi.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur avleiðingar fyri pensjónistar, ið sambært uppskotinum ikki verða mótroknaðir í arbeiðsinntøku.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið sampakkar við millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið samsvarar við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri uppskotið.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, panting og sektir og ger ikki onnur størri inntriv í rættindini hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Tað eru ongar ásetingar um skattir og avgjøld í uppskotinum.

2.12. Gjøld
Tað eru ongar ásetingar um gjøld í uppskotinum.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Til nr. 1
Sambært broytingini verður ikki mótroknað í pensjón hjá pensjónistum, ið ikki hava aðra pensjónsuppsparing enn pensjón sambært lóg um almannapensjónir. Hetta hevur við sær, at teir pensjónistar, ið einans móttaka pensjón sambært hesi lóg, fáa fulla upphædd. Møgulig arbeiðsinntøka og onnur inntøka, so sum nettoinntøkur, ið verða skattaðar eftir reglunum í kapitalvinningsskattalógini og uppsparing eftir reglunum í eftirlønarlógini, hava onga ávirkan á pensjónina.

Til nr. 2
Sambært broytingini verður allýsingin av inntøkugrundarlagnum munandi broytt. Skattskylduga inntøkan, ið verður skilmarkað í § 20, stk. 1, verður broytt soleiðis, at frameftir verður arbeiðsinntøka og í hesum sambandi eisini endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (sonevnda ansingarsamsýningin) og sjúkradagpeningur undantikin. Hetta merkir, at skattskylduga inntøkan frameftir ikki fevnir um arbeiðsinntøku, ansingarsamsýning, sjúkradagpening, sosialar pensjónir, sum nevndar í § 20, stk. 1, nr. 1 og arbeiðsmarknaðareftirløn sum nevnd í § 20, stk. 1, nr. 2.

Skattskylduga inntøkan fer tó framhaldandi at fevna um m.a. útgjald av egnari uppspardari pensjón. Hetta merkir, at pensjón hjá pensjónistum, ið fáa útgoldið pensjón frá egnari

pensjónsuppsparing, eitt nú tænastumannaeftirløn, framvegis verður mótroknað við støði í hesum útgjaldi.

Við broytingini verður samlaða mótrokningin hjá teimum, ið verða mótroknaði í pensjón, lægri enn sambært galdandi reglum, tí frameftir verður ikki mótroknað við støði í arbeiðsinntøku.

Til nr. 3
Broytingin verður gjørd soleiðis, at inntøkugrundarlagið í sambandi við viðbót til ávísar pensjónistar ikki verður ávirkað. Sostatt eru galdandi reglur framvegis galdandi fyri útrokning av inntøkugrundarlagnum til viðbót til ávísar pensjónistar, t.v.s. at inntøkugrundarlagið er seinast uppgjørda skattskylduga inntøkan undantikið sosialar pensjónir og arbeiðsmarknaðar-eftirløn soleiðis, sum hesar eru lýstar í § 20, stk. 1, nr. 4 og 5.

Til § 2
Gildiskomuáseting.

Á Løgtingi, 1. november 2023

Bárður á Steig Nielsen | Helgi Abrahamsen | Magnus Rasmussen

Erhard Joensen | Johan Dahl | Eyðdis Hartmann Niclasen

Kaj Leo Holm Johannesen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:

Fylgiskjal 1: Útrokningar av skatti o.a.